## Bendtner er ikki klárur enn

Danski áleyparin í Arsenal, Nicklas Bendtner, verður mettur ímillum størstu álopstalentini í enskum fótbólti, men venjarin hjá Arsenal, Arsene Wenger, metir hann ikki vera ordiliga kláran til besta liðið enn. – Nicklas er enn ikki klárur at byrja fast í Premier League, men eg ætli mær at geva honum so nógvar møguleikar sum til ber, fyri at fáa hann at skilja, hvat hann enn manglar. Bendtner hevur annars víst síni góðu evni í vinardystum fyri Arsenal, og hann hevur m.a. skorað ímóti bæði Paris St. Germain og Lazio.



## Terry aftur skaddur

Síðsta kappingarár hevði enska stórfelagið, Chelsea, stórar trupulleikar í verjupartinum, tá enski landsliðsverjuleikarin, John Terry, ikki var við. Og nú er sterki verjuleikarin aftur blivin skaddur. Hesa ferð er tað ein skaði í knænum, sum argar, og Terry verður helst ikki klárur fyrr enn um fýra vikur. Sostatt má Chelsea vera hann fyri uttan fyrstu dystirnar av nýggja kappingarárinum í Premier League, samstundis sum hann ikki verður klárur til vinardystin hjá Onglandi ímóti Týsklandi. Harafturat er ivasamt, hvørt Terry verður klárur til týdningarmiklu EM-undankappingardystirnar hjá Onglandi ímóti Ísrael og Russlandi í næsta mánaði.

## Kjartan varógegnigur

**Fyrrverandi B36-formaðurin átti ikki at tikið lut í kæruviðgerðini av máli, har felag hansara er annar parturin, var niðurstøðan hjá Yvirkærunevndini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í síni kæru um úrskurðin hjá Aganevndini førdi Skála millum annað fram, at felagið ikki kundi góðtaka, at fyrrverandi B36-formaðurin var við til at viðgera málið, tá júst B36 var annar parturin í hesum.

Spurningin um gegnið hevði Kjartan Mohr sjálvur reist, tá málið kom til viðgerðar í Aganevndini, men semja var um, at hann væl kundi vera við til at viðgera málið.

Í sínum viðmerkingunum sigur Yvirkærunevndin, at tað ikki ger Kjartan Mohr ógegnigan, at hann í drúgt áramál hevur verið starvsnevndarlimur í B36. Enn tá eitt ár sum formaður.

Hinvegin vísir nevndin á, at Kjartan Mohr framvegis er limur í B36, og at hann tá ikki eigur at taka lut í viðgerð av einum málið, har sama felag er partur av málinum. Yvirkærunevndin leggur tó dent á, at tað ikki er nøkur orsøk at halda, at ósaklig atlit hava verið tikin undir málsviðgerðini hjá Aganevndini.

# Tað ljósnaði í ódnarveðrinum

**Men tað leyp ikki nógv av hjá KÍ, sum var um reppið at missa tepra sigurin móti Skála, sum hevði fleiri óroyndar spælarar á liðnum**

KÍ-SKÁLA
*Jóannes Hansen*

*KÍ*

*Skála*



*Danin, Denni Conteh, var fyri fyrstu ferð at síggja í bláu KÍ-troyggjuni, tá teir tóku ímóti Skála leygardagin. Tað eydnaðist Conteh og KÍ at vinna dystin 1-0 við máli frá Harley Bertholdsen.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað lætnaði hjá klaksvíkingum, tá ið síðsta bríkslið hevði ljóðað í storminum leygardagin. KÍ hevði vunnið 1-0 á Skála, og tað sást á bæði spælarum og viðhaldsfólkum, at tað hevði ovurhonds týdning, at hesi stigini komu til høldar.

Hetta var ikki so undarligt. Sigurin bar við sær, at niðurflytingin blásti eitt sindur longri burtur í øllum vindinum. Og harafturat stóð tað ikki so lítið á síðstu løtuna.

Skála venjarin, John Petersen, hevði vánaligar fyritreytir at arbeiða út frá. Fleiri av stuðulsspælarunum vóru ikki tøkir orsaka av skaðum, og onkrir teirra noyddust á vøllin, hóast teir vóru skaddir.

Síðstu løtuna spenti Skála álopsbogan, eitt nú setti venjarin seg sjálvan á vøllin. Um úrslitið gjørdist eitt, tvey ella trý mála tap hevði ikki so stóran týdning. Liðið varð umskipað, og seinastu løtuna vóru tað bara tveir ella hálvur triði í skálaverjuni.

Tað ráddi um at dyrgja eftir javnleikinum, og fleiri ferðir síðstu løtuna var um reppið, at tað eydnaðist at fáa mál. Bestu møguleikarnar høvdu innskifti og hálvskaddi Slavisa Kaplanovic og miðverjin Milan Curcic, sum úr góðari støðu eftir horna sendi beint á KÍ málverjan.

### Málið og møguleikar

Heimaliðið hevði størri tyngd og breidd, og sammett við tíðliga í hesum árinum er viljin at spæla í staðin fyri at sparka fótbólt so nógvar ferðir størri. Líkindini vóru so mikið vánalig, at dysturin átti at havt verið útsettur til t. d. í gjár, og vánaliga veðrið darvaði spælinum heilt nógv.

Fyritreytirnar at spæla gjørdust ikki betri av, at ov ofta var bólturin ov ovarlaga, og harvið var vindurin uppaftur størri bági, enn hann annars hevði havt verið.

KÍ var grammari, og klaksvíkingar høvdu onkrar møguleikar. Toppskjúttin Paul Clapson var bæði í 1. og serliga í 2. hálvleiki í góðum støðum at gera mál, men heldur ikki hesa ferð eydnaðist tað honum at sleppa upp í part, hóast hann tóktist hava góðan hugburð.

Serliga stórur var møguleikin, tá ið Jan Andreasen stutt eftir, at hann varð fluttur fram á miðvøllin, har hann stóð seg væl, snildisliga stakk bóltin fram ímillum til toppskjúttan. Men PCarin hjá KÍ er ikki so væl virkandi í løtuni, sum hann var fyrr í ár.

Nýggi spælarin, Denni Conteh, sást tað ikki so nógv til. Hann tóktist hava tað torført á váta graslíkinum saman við viðspælarunum.

Einsamalla málið stóðst av tilvild. Harley Bertholdsen sendi frísparkið úr 43 metrum, bólturin støkk eina ferð í graslíkið í brotsteiginum, og millum nógvar klaksvíkingar og skálamenn ferðaðist bólturin umvegis tvørtræið og í málið.

Men í oktober verður tað líka mikið, hvussu klaksvíkingar skoraðu málið, sum bar trý stig við sær. Tað er møguleiki fyri, at hetta illveðursmálið fer at verða munurin millum sunnudags- og leygardagsfótbólt í Klaksvík næsta ár!

# Aganevndin varð kolldømd

**Tað var helst væntandi. Og fríggjadagin staðfesti Yvirkærunevndin hjá FSF, at Skála ikki skal tapa dystin móti B36, har teir høvdu gloymt eitt navn á dómaraseðlinum. Hinvegin setir bótin á 10.000 kr. nýggjan mátistokk fyri bøtur í føroyskum fótbólti.**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað skal ikki kosta á ítróttarliga økinum, um skrivligt mistak verður gjørt á dómaraseðlinum. Tað var aðalsetningurin, sum føroyskur fótbóltur samdist um, eftir at MB í 1990 misti týðandi stig, tá enski Paul Snowball av misgávum ikki var komin við á dómaraseðilin tann eina dystin.

Við úrskurðinum, sum nýggja Aganevndin hjá FSF gjørdi um dystin millum B36 og Skála varð tann siðvenjan broytt, men í so máta hevur Skála fingið beint málið aftur á beint.

Yvirkærunevndin gav nevnliga Skála viðhald í, at teir ikki skuldu dømast at tapa dystin móti B36.

Skála hevði í síni kæru ført fram, at tey ikki hildu revsingina standa mát við brotið, sum varð framt, tá Slavisa Kaplanovic varð gloymdur á dómaraseðlinum til dystin móti B36.

B36 hevði í kæruni ført fram, at dómaraseðilin er eitt av týdningarmestu skjølunum í fótbóltskappingini, og at tað tí er talan um somikið týðandi brot, at Skála eigur at dømast sum tapari av dystinum.

Við støði í føroyskari og norðurlendskari siðvenju vildi Yvirkærunevndin tó ikki staðfesta úrskurðin hjá Aganevndini. Dentur verður lagdur á, at brotið á ongan hátt gav Skála nakrar ítróttarligar fyrimunir, og at hetta heldur ikki varð ætlað so. Tí staðfesti nevndin, at úrslitið av dystinum, sum endaði 1-1, stendur við, men at Skála fær eina bót á 10.000 kr.

Hetta seinasta boðar frá, at tað verður lagdur dentur á, at dómaraseðilin verður rætt útfyltur. Seinast líknandi mál var fyri, fekk B71 1.000 kr. í bót, tí teir av misgávum høvdu skrivað skeivan spælara á dómaraseðilin.